# Stórur Jóladansur á Hálsi

**Felagið Kom og dansa skipar fyri stórum jóladansi leygarkvøldið**

DANSUR
*Tíðindaskriv*

Nú eru jólini í hondum, og tá er eisini lívligt í vikuskiftinum. Nógv jólaborðhald eru, og nógvir útisetar koma heim at vitja.

– Alt hetta ger, at sera nógv fólk leita sær í býin at dansa og hugna sær hesi kvøldarnar. Hetta ger eisini at ringt er at sleppa inn í tey føstu dansistøðini og nærum ógjørligt at fáa pláss at dansa.

Hetta sigur dansifelagið »Kom og dansa« í tíðindaskrivi. Felagið fer at skipa fyri einum jóladansi, so at fólk, sum hava hug at fara í býin fyri at dansa og hugna sær annars, kunnu gera tað uttan at standa sum sild í tunnu.

Tiltakið verður í Ìtróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið 7. december, og vera tað teir vælumtóktu Twiligth, sum fara at spæla til dansin.

– Høllin á Hálsi er stór og og rúmlig, har gott pláss er at dansa. Borð og stólar verða sett upp, og høllin verður pyntað, eins og møguleiki verður at keypa okkurt leskandi.

Twiligth hava spælt til dans í mong ár, og spæla teir sera góðan og fjølbroyttan dansitónleik.

Tiltakið var eisini í fjør, og var tað sera væleydnað. Einasta lýti við tiltakinum í fjør var, at í Batmintonhøllini var at eitt eyka gólv at lagt oman á verandi gólv, og partar av hesum var ikki serliga vælegnað at dansa á, men í høllini á Hálsi er eingin trupuleiki av hesum,

Fyrireikarnir vóna, at hetta verður eitt afturvend-andi tiltak til gleði fyri bæði ung og eldri.

Forsøla av atgongumerkjum er í Kunningarstovuni í Havn.

Aldursmarkið er sett til 20 ár.

# Allar skráir fáast í Sosialinum

**Í VARPINUM – nýggja blaðið við skráum hjá Sosialinum, skal tú finna allar tær skráir, tú hevur tørv á**

SJÓNVARPSBLAÐ
*Eirikur Lindenskov*

Í blaðnum í dag fáa lesarar okkara á fyrsta sinni nýggja sjónvarps- og útvarpsblaðið, Varpið, sum vit fara at hava í blaðnum hvønn fríggjadag.

Tað hevur leingi verið ætlanin at menna Hygg & Hoyr til at umfata fleiri skráir. Nú Televarpið er farið at senda, og øll húski harvið fáa lættari atgongd til nógvar sjónvarpsrásir, hava vit nýtt høvi at broyta blaðið við skráunum, sum nú eitur VARPIÐ.

Hugsanin við nýggja blaðnum er sjálvandi, at tað skal liggja frammi alla vikuna, so fólk har kunnu fáa eitt yvirlit yvir, hvat er at síggja á ymsu sjónvarpsrásunum og hvat er at



*Johnny Gaard, stjóri á Team 85, Eirikur Lindenskov, blaðstjóri á Sosialinum og Høgni Jacobsen, grafikari á Team 85 skoða nýggja sjónvarps- og útvarpsblaðið hjá Sosialinum, Varpið, tá tað varð prentað á Prentmiðstøðini mikukvøldið*

*Mynd: Jonhard Hammer*

hoyra á teim føroysku útvarpsrásunum.

Av tekniskum ávum hevur tað ikki borið til at fingið allar skráirnar fyri allar sjey vikudagarnar frá øllum. Vit vænta tó, at hetta verður fingið í rættlag í næstu viku.

Tað er Team 85 sum hevur gjørt lay-outið til nýggja blaðið, Hestprent hevur umbrotið, skorið og heft, og blaðið verður prentað á Prentmiðstøðini






